# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Nógv bendir á, at venjarin hjá EB/Streymi, Sigfríður Clementsen, kann vænta sær revsing, tí hann eftir dystin ímóti KÍ í Klaksvík í gjár úttalaði seg í so opinskáráð um Petur Reinert, dómara*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

# Sigfríður Clementsen kann fáa tveir dagar

**Eftir dystin í Klaksvík í gjár gav venjarin hjá EB/Streymi, Sigfríður Clementsen, ilt av sær í beinleiðis útvarpssamrøðu á Rás 2 og fanst at dómaranum í dystinum í Klaksvík, Petur Reinert. Nú kann Sigfríður helst vænta sær eina ella aðra revsing frá Kappingarnevndini, sum hevur hoyrt tað, sum var sagt í samrøðuni eftir dystin**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tað kemur meiri enn so fyri, at menn kunnu vera heitir, tá teir beint eftir ein dyst skulu úttala seg, men tað er meira sjáldan, at ein venjari tekur munnin so fullan, sum venjarin hjá EB/Streymi, Sigfríður Clementsen, gjørdi tað í beinleiðis útvarpssamrøðu á Rás 2 eftir 0-0 dystin ímóti KÍ í Klaksvík í gjár.

– Eg føli eisini, at ein ávísur Petur Reinert er ófatiliga óheppin í einum trimum støðum. Eg vil ikki siga fanansaktigur, men tað er tætt við, vóru orðini hjá Sigfríði Clementsen, sum løtu seinni segði soleiðis:

– Nú segði eg ikki, at Petur Reinert hevði skyldina, men eg sigi bara tað, at í vissum støðum er eitt brotsspark eitt øgiliga týdningarmikið ting, og tað vísir seg, at hann torir ikki at døma tey, og tað er eitt sindur ergriligt.

### Bartal sum fordømi

Hóast orðini óivað eru fallin í sinnismuni og í hitanum, sum kann vera til staðar, tá ein dystur úrslitaliga ikki hevur lagað seg eftir vild, bendir nógv á, at Sigfríður Clementsen nú kann vænta sær eina ella aðra revsing frá Kappingarnevndini.

– Vit hava hoyrt tað, sum er blivið sagt, og mugu so taka støðu til, um tað fær avleiðingar, sigur formaðurin í Kappingarnevndini, Sveinur Tróndarson, ið annars ikki vil gera aðrar viðmerkingar til málið.

Bara tað, at Kappingarnevndin hevur fingið við, hvat er sagt, er næstan nóg mikið til at staðfesta, at málið verður tikið upp á fundi í Kappingarnevndini, tí fordømi er um, at revsing er givin, tá onkur hevur verið í so opinskáraður, at tað kann koma undir tað, ið kallast »Óhøviskur atburður/málburður í sambandi við dyst og venjing«.

Tað kostaði Bartali Eliasen karantenu í tveir dystardagar, at hann eftir dyst millum NSÍ og ÍF í Runavík tann 30. april í fjør úttalaði seg um dómaran í dystinum í samrøðu við Kringvarpið, so tí er ikki óhugsandi, at Sigfríður Clementsen nú eisini kann renna seg í eina karantenu í tveir dagar.

### Helst skjót avgerð

Sambært eitt rundskriv frá Kappingarnevndini í 2007 er lagt upp til, at »leikarar, venjarar, leiðarar og onnur, sum í sambandi við dyst ella venjing, vísa óhøviskan atburð mótvegis leikarum, leiðarum, venjarum, dómarum, áskoðarum ella øðrum, skulu vanliga hava leikbann 1-3 dystir, um tað ikki er grundarlag fyri enn longri banni«.

Um so er, at Kappingarnevndin kemur til ta niðurstøðu, at Sigfríður Clementsen onkursvegna skal revsast fyri tað, hann segði eftir dystin í Klaksvík í gjár, er talan um eina revsing, sum er endalig og ikki kann kærast til Aganevndina.

Nú tætt er millum dystirnar í føroysku kappingini, er hugsandi, at Kappingarnevndin tekur málið upp sum skjótast, helst í dag ella í morgin, og somuleiðis kemur við einum skjótum úrskurði.

# KÍ-verjan er triðbest

**Men saman við 07 Vestur og ÍF tykist KÍ framvegis at vera favorittur til niðurflyting, meðan HB, sum sunnudagin fær vitjan av klaksvíkingum, saman við NSÍ er FM favorittur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er stutt millum umførini, og í løtuni dragnar millum tey í toppinum og so hini. Átta umfør eru løgd afturum, og harvið hava 24 stig verið upp á spæl.

Toppliðini eru HB við 19 og NSÍ við 17 stigum, og avrikini og úrslitini síðstu ferðirnar boða frá, at hesi bæði í løtuni eru bestu boðini upp á gullkrónurnar. Felags fyri bæði er, at tey síðstu dagarnar hava vunnið tvær ferðir á útivølli. HB í Fuglafirði og Sørvági og NSÍ í Gundadali ímóti B36 og í Fuglafirði.

Tvey onnur hava vunnið góða úrtøku bæði sunnudagin og í gjár. Tey eru Víkingur og B68, sum í innanhýsis uppgerð sunnudagin spældu 3-3, og sum í gjár bæði vunnu á útivølli.

Tað liðið, sum í løtuni hevur torførast við at liva upp til tað, sum tað frammanundan var og verður roknað við, er meistaraliðið í Sundalagnum. Í gjár var tað triðju ferð á rað, at EB/Streymur fór av vøllinum við javnleiki – 0-0 á heimavølli ímóti B36, 1-1 á Argjum og nú 0-0 í Klaksvík. Burtur úr hesum trimum umførunum hevur HB vunnið sjey stig – ella fýra meiri enn EB/Streymur, sum má metast at vera undir ikki sørt av trýsti, tá ÍF sunnudagin fer at vitja við Margáir.

Meðan EB/Streymur kendi seg at hava tapt tvey stig í Klaksvík, fjaldu klaksvíkingar ikki yvir, at teir kendu seg at hava vunnið eitt stig. Sunnudagin spælir KÍ á útivølli ímóti favorittunum í HB. Eingin roknar við øðrum enn fullari úrtøku til HB, og tað ger ikki uppgávuna torførari hjá KÍ, sum talvan sigur hevur triði bestu verjuna. Bara verjurnar hjá HB og EB/Streymi hava verið betri enn unga KÍ-verjan við Jákupi Mikkelsen millum stólparnar!

Í átta teimum fyrstu umførunum hevur KÍ vunnið fýra stig – í fýra javnleikum. Í gjár helt onkur í »Triðja hálvleiki« á Rás 2, at hetta var góður sjálvsstýrispolitikkur – stig fyri stig! Kappingin sum heild er trupul hjá KÍ. Merkisvert er tað, at klaksvíkingar hava megnað javnleik ímóti trimum av teimum ovastu, NSÍ, Víkingi og EB/Streymi, men tapt fyri ÍF og AB og bara megnað javnleik á heimavølli ímóti 07 Vestur, sum eru í tyngra endanum.

Sunnudagin verður fyrsti triðingurin av hesum kappingarárinum av. Enn er langt á mál, men nógv skal venda øðrvísi, enn tað nú ger, um niðurflytararnir ikki skulu finnast millum KÍ, 07 Vestur og ÍF, og um HB ella NSÍ ikki verður meistari. Víkingur, EB/Streymur og B68 fara ivaleyst at mótmæla seinnu útsøgnini, meðan teir í AB og kanska eisini B36 eru fegnir um hina!



*EB/Streymur er enn eitt petti frá toppinum, meðan KÍ – hóast botnstøðu – hevur triðbestu verjuna í landinum*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*